# Barnarættindi




## Barnarættindi

20. tími

## Vert at vita

Menniskjuni eru øll ymisk: kyn, aldur, útsjónd, húðarlit, átrúnaður, likamlig støða, fíggjarstøða, persónligar meiningar ella gerðir. Fyri at tryggja, at øll menniskju verða vird og hava rættindi til frælsi, talufrælsi, trúarfrælsi, rættvísi og frið í heiminum, hava Sameindu Tjóðir gjørt ein sáttmála, og álagt øllum limalondum at halda sáttmálan. Limalondini hava skyldu til, í samstarvi við Sameindu Tjóðir, at tryggja at mannarættindini og frælsisrættindi verða alment vird og hildin. Treytin fyri, at henda skylda verður hildin er, at allir partar skilja hesi rættindi og frælsi.

Børn hava rætt til mat, stað at búgva og heilsugott lív. Børn hava rætt til at menna seg, rætt til skúlagongd og frítíð. Børn hava rætt til umsorgan og verju ímóti kríggi, harðskapi og misnýtslu. Børn hava rætt at vera við í avgerðum, sum hava við tey at gera. Hetta átti at verið ein sjálvfylgja, at øll børn verða væl viðfarin, men veruleikin er mangan øðrvísi. Milliónir av børnum hava eitt trupult lív. Børnum tørva, at onkur talar teirra søk. Tí hava Sameindu Tjóðir ein altjóðasáttmála um barnarættindi.

Tann 20. november 1989 samtykti aðalfundurin hjá Sameindu Tjóðir altjóðasáttmálan um barnarættindi.
Sáttmálin um barnarættindi hevur til endamáls at

- tryggja øll børn móti órættvísi og útarming
- geva øllum børnum møguleika at taka lut í avgerðum, ið ávirka lív teirra
- gera sítt til at skipa eitt rættvíst altjóðasamfelag, sum ikki bert børn, men øll mannaættin, hevur krav á

Sáttmálin kom í gildi á heysti 1990, tá fleiri enn 20 lond høvdu viðurkent hann. Føroya Løgting setti við kunngerð nr. 90 frá 7. oktober 1993 sáttmálan í gildi frá 11. mai 1993.

Niðanfyri er einfaldaða útgávan av altjóðasáttmálanum um barnarættindi:

1. grein: Hvat er eitt barn
Allir persónar undir 18 ára aldur, ásetir landsins lóg ikki lægri lógaldur.

2. grein: Javnstøða og verja fyri mannamuni
Grundreglan um, at øll rættindi galda fyri øll børn uttan undantak. Tað er landsins skylda at verja børnini fyri øllum mannamuni.

3. grein: At tryggja áhugamálum barnanna
Tað er samfelagsins skylda at tryggja áhugamálum barnanna, tá avgerðir vera tiknar. Samfelagið hevur skyldu at gera serstakar reglur til verju fyri børnini.

4. grein: Útinning av endamálum sáttmálans
Samfelagið hevur skyldu at halda sáttmálan í orðum og verki.

5. grein: Leiðbeining av foreldrum
Foreldur eiga at verða leiðbeind soleiðis, at børnini búnast samsvarandi evnum og møguleikum teirra.

6. grein: Rætturin til lívið
Barnsins rættur til lívið og skylda samfelagsins at tryggja børnunum undankomu og menning.

7. grein: Navn og tjóðskapur
Børn hava rætt til navn og tjóðskap frá vøggustabbanum

8. grein: Verja av samleika
Skylda samfelagsins at verja og, um neyðugt, endurstovna barnsins grundleggjandi samleika (navn, tjóðskap og ættarbond).

9. grein: Verja foreldranna av barninum
Børn hava rætt at búgva hjá foreldrunum, uttan so at mett verður, at hetta samsvarar ikki tørvi barnanna. Børn hava rætt til samband við bæði foreldrini, hóast tey ikki búgva hjá teimum. Er tað av samfelagsávum, at barnið er tikið frá foreldrunum, hevur samfelagið skyldu at knýta sambandið aftur við foreldrini.

10. grein: At føra familjur saman
Børn og foreldur hava frítt at fara úr hvørjum landi sum helst og venda aftur til egið land at verða sameind.

11. grein: Barnaræning
Samfelagið hevur skyldu at forða fyri, at børn verða rænd í útlondum av foreldrum ella øðrum.

12. grein: Rættur at siga sína hugsan
Børn hava rætt at siga sína hugsan og krav um, at hugsan teirra verður vird.

13. grein: Frælsi at bera boð og fáa upplýsingar
Børn hava rætt at boða frá sínum kenslum og sjónarmiðum, tó uttan at gera seg inn á annara rættindi. Børn hava rætt at leita eftir, fáa og lata upplýsingar frá sær.

14. grein: Tanka-, samvitsku- og trúarfrælsi
Børn hava rætt at trúgva og tilbiðja. Samfelagið hevur skyldu at virða undirvísing í trúarlæru.

15. grein: Rættur at stovna feløg
Børn hava rætt at gerast limir í feløgum og vera við at stovna feløg, tó uttan at gera seg inn á annara rættindi.

16. grein: Verja av heimalívi
Børn hava rætt til verju fyri tilvildarligari ella ólógligari uppílegging í heimalívið.

17. grein: Týdningur av fjølmiðlum
Samfelagið hevur skyldu at tryggja børnunum atgongd til upplýsingar frá hóskandi nøgd av innlendis og altjóða tíðindamiðlum.

18. grein: Barnauppaling
Samfelagið hevur skyldu at tryggja, at barnsins foreldur ella verji hava høvuðsábyrgdina av uppalingini, og at geva vegleiðing og hjálp í hesum sambandi.

19. grein: Verja móti ringari viðferð
Samfelagið hevur skyldu at verja barnið móti allari ringari viðferð frá foreldrum ella øðrum, at fyribyrgja allari ringari viðferð og at bøta um fylgjurnar av tílíkari viðferð.

20. grein: Foreldraleys børn
Samfelagið hevur serliga skyldu at verja børn, sum hava mist foreldur og familju og at tryggja teimum aðra røkt og, um tað krevst, ættleiðing.

21. grein: Ættleiðing
Samfelagið hevur skyldu at tryggja at loyvi einans verður givið til ættleiðing, um tað er til barnsins frama.

22. grein: Flóttabørn
Samfelagið hevur skyldu at tryggja serstaka verju av børnum á flótti ella sum søkja um flóttastøðu og at samstarva við avvarðandi felagsskapir flóttabørnum til verju og hjálpar.

23. grein: Brekað børn
Brekað børn hava rætt til bestu hjálp, umsorgan og upplæring at tryggja teirra sjálvsálit og møguleikar til ríkt og virkið lív.

24. grein: Heilsa
Børn hava rætt til heilsu og eiga at fáa læknahjálp við serligum atliti at fyribyrgjandi heilsurøkt. Samfelagið hevur skyldu at minka um tilburðir av barnadeyða og at virka fyri, at gamlir siðir, ið kunnu skaða heilsu barnanna, verða avlagdir.

25. grein: Reglulig kanning av viðurskiftum hjá børnum á stovni
Samfelagið hevur skyldu til við regluligum millumbilum at kanna viðurskiftini hjá børnum, ið búgva á røktar- og viðgerðarstovnum.

26. grein: Almannatrygd
Børn hava rætt til almannatrygd.

27. grein: Lívskrøv
Børn hava rætt til hóskandi lívskrøv. Foreldrini hava høvuðsábyrgdina av, at hesi krøv verða lokin, og samfelagið hevur skyldu at hjálpa til, um tað er neyðugt.

28. grein: Upplæring
Børn hava rætt til upplæring, og samfelagið hevur skyldu at tryggja øllum børnum skyldubundnan og ókeypis barnaskúla við menniskjansligum agareglum.

29. grein: Endamálið fyri upplæringini
Samfelagið hevur skyldu at tryggja, at upplæringin virkar til at menna barnsins persónsmensku og evni, at hon fyrireikar barnið til eitt virkið vaksnamannalív, fremur virðingina fyri mannarættindum og at mennir virðingina fyri barnsins egnu mentunarligu og tjóðskaparligu virðum.

30. grein: Minnilutar
Børn, ið hoyra til minnilutabólkar, hava rætt til at liva samsvarandi teirra egnu mentan og átrúnaði og at tala sítt egna mál.

31. grein: Frítíð og hvíld
Børn hava rætt til frítíð, hvíld og spæl og at taka lut í mentanarligum og skapandi virksemi.

32. grein: Barnaarbeiði
Samfelagið hevur skyldu at verja børn fyri arbeiðsumstøðum, ið kunnu hótta teirra heilsu, upplæring og menning. Minstialdur og trygd eiga at verða fyriskipað.

33. grein: Misnýtsla av rúseitri
Børn hava rætt til verju fyri misnýtslu av rúseitri og fyri at verða sett í arbeiði við framleiðslu og sølu av rúseitri.

34. grein: Kynslig misnýtsla
Børn hava rætt til verju fyri kynsligari misnýtslu, skøkjuvirki og medvirkan til barnaporno íroknað.

35. grein: Søla og rán av børnum
Samfelagið hevur skyldu til at nýta øll ráð at forða sølu av børnum og barnaráni

36. grein: Onnur misnýtsla av børnum
Børn hava rætt til verju fyri øllum øðrum sløgum av misnýtslu.

37. grein: Píning og revsing
Samfelagsins skyldur mótvegis børnum, ið eru handtikin ella sett í varðhald. Bann fyri píning, grimari ella niðrandi viðferð, revsing, deyðarevsing og lívlongum fongsli. Børn, sum sita í fongsli, hava rætt til menniskjansliga viðferð, mugu ikki sita saman við vaksnum og hava rætt til samband við familjuna.

38. grein: Vápnað stríð
Samfelagið hevur skyldu at halda altjóða avtalur um krígsførslu, eitt nú at tryggja at børn undir 15 ára aldur ikki taka lut í bardaga og at avmarka útskrivingn av 15-18 ára gomlum til vápnaða tænastu. Í Vápnaðum stríði hava øll børn rætt til verju og røkt.

39. grein: Endurbúgvandi røkt
Samfelagið hevur skyldu til at tryggja øllum børnum, ið hava verið fyri vanrøkt, píning ella misnýtslu, best møguliga viðgerð, soleiðis at tey kunnu mennast aftur sum samfelagsborgarar.

40. grein: Viðferð av børnum í rættinum
Børn undir ákæru hava krav um rættarhjálp og rættvísa viðferð. Samfelagið hevur skyldu til at hava serliga umsorgan fyri ungum lógbrótarum og at royna at endurbúgva teir heldur enn revsa.

41. grein: Barnsins frami
Landsins lógir ella altjóða reglur, ið tryggja børnum betri rættindi enn hesin sáttmálin, eiga at nýta frama, har tað er gjørligt.

42. grein: Almenn kunning um sáttmálan
Samfelagið hevur skyldu til at kunngera henda sáttmálan bæði fyri vaksnum og børnum.

43. grein: Nevnd at taka sær av barnarættindum
Skipað verður ein nevnd at taka sær av, at reglurnar í hesum sáttmála verða settar í verk og hildnar.

44.-54. greinir: Frágreiðingar til nevndina
Tey lond, ið hava staðfest henda sáttmálan, hava skyldu at senda nevndini frágreiðingar. Eftirlit við at sáttmálin verður hildin. Undirskrift, staðfesting, gildiskoma og onnur viðurskifti.

Sangur: „At liva, tað er at elska" av fløguni *Vinir mínir og eg.*

## Prát

Lærarin spyr:

- Hvørji eru tit?
- Hvat tørvar tykkum fyri at fáa eitt langt, heilsugott og eydnurík lív?
- Hvør ábyrgd fylgir við at hava rættindi?
- Hvussu kunnu tit tryggja, at øll menniskju hava somu rættindi?

Lærarin býtir talvuna í tvey. Øðrumegin „Eitt gott lív" og hinumegin „Eitt ringt lív" og skrivar uppskotini á talvuna.

## Eitt gott lív og eitt ringt lív

Næmingarnir skriva uppskotini í loggbókina.

Lærarin tekur samanum – takk fyri í dag!